gult cyan magenta svart

VIÐMERKINGAR

Latið okkum nú ikki verða ov mikið bráðar

Jóannes Eidesgaard

Líkt er til, at Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur við sínum viðmerkingum eftir seinastu veljarakanningina hevur sett gongd á gitingarnar í fjølmiðlunum um, hvussu næsta samgongan fer at síggja út. Men tað er jú eingin grund til at leypa framav. Vit hava jú eina samgongu, og sjálvt um hon hevur tað sera trupult, so situr hon enn, og einki løgtingsval er útskrivað.

Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, sum vreuliga hevur ment seg seinastu tíðina sum politiskur viðmerkjari, segði eftir seinastu veljarakanningina, at hann metti, at nú var stundin komin, har Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin saman komu við einum alternativi til uppskotið hjá landsstýrinum til eina sjálvstýristilgongd.

Mín egna viðmerking í sama sambandi var, at eg metti, at nú var tíðin komin til, at vit í Javnaðarflokkurin nú munandi meira enn áður komu fram við okkara egna uppskoti til eina Sjálvstýrislóg.

Men mangt bendur á, at fjølmiðlar hava tikið orðini hjá Jógvani Mørkøre til sín og eru nú í fullari ferð við at gita um næstu samgongu. Tað er sjálvandi altíð spennandi at gita um komandi samgongur, men mær tykir, at man er í so bráður. Vit hava hóast alt eina samgongu, og sjálvt um hon hevur stórar trupulleikar, so situr hon enn, og eitt løgtingsval verður so ikki í næstu viku.

Føroyskur politikkur skilir seg frá eitt nú donskum politikki í so mongum. T.d. hava vit ikki fyri vana í Føroyum at gera samgongur, áðrenn eitt løgtingsval, men lata allar møguleikar standa opnar, meðan man í Danmark gjarna veit áðrenn valið, hvørjir flokkar vilja samstarva sum stjórn, og hvørjir flokkar stuðla stjórnini, hóast teir ikki eru við í sjálvari stjórnini. Hetta fer fram á tann hátt, at ymisku flokkarnir siga, hvønn forsætismálaráðharra teir vilja hava.

Og hvussu sær politiski heimurin út rundan um Javnaðarflokkin, tá tað snýr seg um sjálvstýrismálið?

• Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava í hesum valskeiðnum havt eitt framúr gott samstarv, sum lættliga kann røkka inn í eina komandi samgongu. Vit høvdu stórar trupulleikar við samstarvinum í 1996, men hava í andstøðu síðan seinasta val rættiliga funnið eitt frálikt stev í samstarvinum. So møguleikin fyri, at hesir báðir flokkar verða at síggja í einari komandi samgongu, er avgjørt til staðar. Eisini hava báðir flokkarnir orðað ein felags politikk í sjálvstýrismálinum í tí felags áliti, sum varð gjørt, tá landsstýrið fyrireikaði seg til fyrsta samráðingarfundin.

• Hin vegin aftur, so er tað eisini ein veruleiki, at Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin skrivaðu undir eitt samgonguskjal í januar 1991, har vit boðaðu frá, at nú fóru vit undir at seta eina Sjálvstýrislóg í verk. Og síðan tá er ikki tað stóra hent á sjálvstýrisleið, hóast nógv hevur verið tosað og skrivað. Sjálvstýrislógin varð ikki av nøkrum í tí samgonguni, hóast fyrsta stigið – ein nýggj stýrisskipanarlóg – varð gjørd, tí vit fingu meira enn úr at gera, tá landið og búskapurin kollsigldi. So um sjálvstýristilgongdin, sum samgongan nú hevur borðreitt við, ikki verður av nøkrum, so veit eg, at Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin kunnu semjast rættiliga langt á sjálvstýrisleið.

• Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin have eitt langt samstarv at líta afturá. Og hetta samstarv hevur m.a. bygt á, at flokkarnir altíð hava kunnað tosað saman, eisini tá tað snúði seg um sjálvstýrispolitikk. Og eg eri onga løtu í iva um, at skuldi okkurt borist á hjá sitandi samgongu, og ein nýggj støða tók seg upp, so kundi hesir báðir flokkar uttan iva funnið eitt felags stev í sjálvstýrismálinum.

• Tjóðveldisflokkurin hin vegin hevur lagt seg á ein bógv, sum vit í Javnaðarflokkinum als ikki kunna fylgja. Tað er okkara erliga uppfatan, og tað meini eg eisini, at vit skylda at siga.

Samanumtikið, so er meira enn ein møguleiki, og at leggja seg á eina ávísa samanseting longu nú, vildi verið skeivt og ábyrgdaleyst, og tí gera vit tað heldur ikki, hóast Jógvan Mørkøre heldur nakað annað.

Hvør segði satt

Jógvan við Keldu
løgtingsmaður

Sjálvandi eigur løgmaður at fara beinleiðis til NATO, um nakar ivi er um, at ikki allar upplýsingar koma á borðið frá donsku ríkismyndugleikunum um útbyggingina í Føroyum

Helst er ilt hjá mær at gera nakra niðurstøðu av hendingaríka fundinum í Uttanlandsnevndini hósdagin 8. febr., tí eg var ikki á fundinum.

Orsøkin til at eg ikki møtti var, at eg júst hevði verið í Norðurlandaráðnum og eykamaðurin Eyðun Viderø tí skuldi møta. Men av eini misskiljing var Fólkaflokkurin ikki umboðaður henda dagin.

Hinvegin havi eg gjørt mær mínar tankar um fundin, av tí eg síðani havi hoyrt, og tí sum fyriliggur av skrivligum frá fundinum. Mín niðurstøða verður ikki langt av leið. – Eingin ivi er um, at bæði Heðin Mortensen og Jóannes Eidesgaard hava sagt meira »enn gott er«.

Tí haldi eg eisini, sum eg segði við formannin í nevndini, Hergeir Nielsen, áðrenn fundin seinasta týsdag, at eg helt hann vera heldur provokerandi við í samrøðuni í sjónvarpinum hetta kvøldið at siga, at »menn, sum krøktu seg saman í látri, tá skrivað varð beinleiðis til ST«. Tí tá menn hava gingið ov langt, er tað teimum nóg mikið. Tá er ilt at tola meira.

Løgmaður skal vera neyvur við kanningunum

Lat meg beinanvegin siga mína støðu viðvíkjandi upplýsingum um útbyggginganrætlanirnar, sum NATO arbeiðir við í Føroyum.

Vit hoyra til vesturlendska samtakið. Løgmaður eigur at taka upp samráðingar við donsku stjórnina – skjótast gjørligt – um hesa útbyggingarætlan, og er nakar sum helst ivi um at ikki allar upplýsingar koma á borðið, eigur honum at vera heimilað at fara víðari beinleiðis til NATO. – Hvussu hetta verður gjørt, skal sjálvandi verða latið upp til løgmann og umsiting hansara.

Vit eiga at vera sera nærlagnir og neyvir í hesum máli, serliga tá vit síggja hvat fyrr er fyrifarist.

Løgin sjónvarpspolitikkur

Tá hetta so er sagt, fari eg at nevna nakað um sjónvarpssendingina eftir henda – eftir øllum at døma – spennandi fundin.

Fyrst kemur sjónvarpið við eini sigandi yvirskrift. Síðani er samrøða við formann Uttanlandsnevndarinnar, Hergeir Nielsen, har hann ger sínar metingar av nevndararbeiðinum og gevur eftir síni meting eina niðurstøðu.

Spurningurin er so, um nevndarlimir Heðin Mortensen og Jóannes Eidesgaard hava verið nóg greiðir á fundinum, tá formaðurin fer út við hesum boðum. – Her stendur so ord móti orði.

Tað, sum síðani hendir, sum er átalu vert, og sum avgjørt hevur eina politiska slagsíðu er, at eftir ein heilt onnur sending er lokin, nevniliga »Grannar okkara«, situr Jóannes Eidesgaard í stólinum saman við vertinum.

Skráin verður broytt uttan ávaring, sum ikki hendir uttan eitt hvørt heilt serligt er áfatt, t.d. tá ein ríkisleiðari er deyður ella líknandi. Her situr verturin sum ein annar David Frost og tekur eksklusivt interview við formann Javnaðarfloksins fyri at siga, at tað, sum formaðurin í Uttanlandsnevndini segði í vanligu tíðindasendingini fyrr um kvøldið, var ósatt.

Eg spyrji bara, ber hetta til.

Henda spurning fari eg at lata víðari í bræv til landsstýrismannin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, tí eitt tílíkt bræv er helst nyttuleyst at senda til leiðslu sjónvarpsins.

Jú, loysingin kann líknast við hjúnarskilnað

Marni Tyril

Líknilsið hjá Helga Abrahamsen, har loysingin verður líknað saman við hjúnaskilna, kann brúkast til okkurt. Í líknilsinum verður maðurin (Føroyar) lýstur sum órímiligur yvir fyri konuni (Danmark). Tó manglaðu nakrir týðandi upplýsingar:

1) Hjúnarbandið var einvegis tvingað yvir høvdið á manninum.

2) Maðurin hevur næstan onga ávirkan havt á allar avgerðir í hjúnabandinum.

3) Maðurin hevur alla tíðina verður kúgaður …eitt nú varð til fyri kortum noktað honum at læra børnini sítt egna mál, og eitt nú skal øll samrøða og samskifti við onnur ganga ígjøgnum og góðkennast av konuni.

4) Tá maðurin talar um at kanska var best at lata seg skilja, koma revsitiltøk frá konuni. Serliga hóttir hon við at taka beinini undan manninum búskaparliga (maðurin er meira heftur búskaparliga at konuni, enn konan atmanninum).

5) Maðurin umhugsar at biða um eitt tíðarskeið á eitt ár (sí notu) við seperatión, til at gera seg leysan av búskaparliga haftinum, men svarið er, at seperatión kemur ikki upp á tal…og biður maðurin um tað, hevur hann 3 mánaðir til at skúgva seg út úr húsinum. Spurningunum, ið settir vórðu fram, vil eg tí svara við hesum:

I) At konan ikki hevur rætt tá hon pástendur at seperatión er tað sama sum skillsmissa.

II) At konan er órímilig tá hon ikki vil hjálpa manninum í eitt (1) ár.

III) At maðurin átti at havt somu rættindi sum konan í teirra felags heimi meðan tey eru sepereraði.

Taka vit nú og býta um upp á konuna og mannin, soleiðis at Danmark er maðurin og Føroyar er konan, haldi eg at støðan verður hópin betur lýst. Hetta er jú søgan um ta klassisku bukaðu konuna, sum ikki torir at skilja seg frá manninum, tí hon ræðist hóttanirnar frá honum.

Tað tykist eisini sum nógvir føroyingar hava sama hugburð sum klassiska bukaða konan: »Kann vera at eg verði kúgað og bukað og ikki havi nakað lív, men ... havi eg tað ikki fínt sum tað er?«

Nota:

Tíðin er umroknað so at 600 ára ríkisfelagsskapur svarar til 50 ára hjúnarband, also 12 ár í veruleikanum svara til (12*50/600) ár = 1 ár í líknilsinum.

FISKIVINNUTÍÐINDI

Nógv bíligari at byggja í Kina

Spildurnýggi íslendski kúfiskabáturin Fossá kom á Havnina um nýggju tíðina í gjáramorgunin. Hann er bygdur í Kina og hervið spardu eigararnir 30-40 prosent av kostnaðinum, samanborið við, um báturin varð bygdur í Europa.

Justinus Leivsson Eidesgaard

Tað loysir seg at byggja skip í Kina, í hvussu er tá hugt verður eftir kostnaðinum. Menn úr Tórshøfn á Langanesi hava keypt eitt skip, sum, teir skulu nýta til at fiska kúfisk við.

– Kanska góðskan ikki er heilt tann saman sum um skipið hevði verið bygt her á leið, men skipið er gott og vit fáa tað munandi bíligari, sigur þórstein þorbergsson, skipari á Fossá.

Fossá hevur verið ein rættuligan royndartúr. Teir hava siglt 10.000 míl, heilt úr Kanton í Kina og til Føroya. Skipið hevur roynt seg í øllum líkindum og teir lata væl at. Teir løgdu inn í Føroyum vegna veður og halda leiðina fram til Íslands, so skjótt veðrið batnar.

Skiparin á kúfiskabátinum Fossá sigur, at hann sparir nógvar pengar við at byggja skip í Kina

12.000 tons um árið

Fossá, er ikki nakað stórt skip. Skipið lastar 110 tons av kúfiski og fyri at kunna standa seg,so skulu teir veiða 12.000 tons árliga.

– Prísurin á kúfiski er ikki góður og tí skal stór nøgd til. Í Íslandi er ikki pláss fyri meira enn fýra kúfiskabátum. Stovnurin er viðbrekin. Eg havi verið í hesi vinnu seinastu fimm árini. Vit vóru so óhepnir við fyrra bátinum hjá okkum, at hann sakk. Óeydna hevur verið við kúfiskabátunum í Íslandi. Vestfirðingar hava eisini mist ein, hann sakk eisini,sigur þórstein þórbergsson.

– Kúfiskurin, íð er skeljafiskur, finnst inni við lang millum 50-70n favna dýpi. Vit føra fiskin livandi til lands og so verður hann virkaður á einum virki í þórshøfn. Vit arbeiða saman við eini fyritøku í USA og hendan selir allan fiskin. sigur þórstein þórbergsson, skipari.

Fimm manns eru við skipinum. Teir rokna við at fáa last eftir 30 tímum. Tað er felagið Íslendskur Kúiskur EHF.

2500 tons eftir tveimum døgum

Justinus Leivsson Eidesgaard

Svartkjaftatrolararnir hava góðan fiskiskap í løtuni. Tróndur í Gøtu lá í gjár á Fuglafiði og landaði. Teir vóru ikki lidnir at landa, tá blaðið fór til prentingar, men teir mettur seg at hava 2500 tons inni. Teir vóru bert tveir dagar á feltinum hendan túrin.

Tróndur í Gøtu

Svartkjaftatrolararnir royna í løtuni vestur úr Írlandi. Tað tekur tvey døgn at sigla á fiskileið. Í løtuni eru Krúnborð og Christian í Grónttinu á fiskileið.

Jón Sigurdsson og Jupiter eru á lodnuveiðu undir Íslandi og Finnur Fríði er á sildaveiðu í Norðsjónum.

Veiddu 21.000 t. av toski í fjør

Føroysk skip veiddu 21.000 tons av toski undir Føroyum í fjør og meðalprísurin fyri stóran tosk, yvir sjey kilo kom bara einaferð niður um 20 krónur. Tað var í apríl. Í desember var miðalprísurin kr. 25,90. Toskur millum 4-7 kilo lá eisini yvir 20 kr. kiloið næstan alt árið. Í apríl og mai fór hann beint undir, sigur Hagstovan.

Árið í fjør var ikki nakað stórt toskaár. Fara vit aftur til 1996 og 97, so veiddu føroyingar yvir 30.000 tons hesi árini, men úrtøkan hevur verið góð, tí prísurin hevur verið so høgur.

je

Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 165.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur:114.600,- Garanti**

TOYOTA CAMRY 2,0 GLI
Skrás.: 10-07-91
Km.: 129.000
Prísur: 69.600,-
Sýnaður 10-00

TOYOTA COROLLA 1,8 DIESEL
Skrás.: 29-05-89
Km.: 263.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL
Skrás.: 23-06-99
Km.: 22.000
Prísur: 169.000,- Garanti**

VOLVO 460 SEDAN
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-
Sýnaður 06-99

TOYOTA CARINA E 2.0 GLI SEDAN
Skrás.: 24-08-95
Km.: 112.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL
Skrás.: 10-01-96
Km.: 80.000
Prísur: 128.600,- Garanti*
Sýnaður 09-00

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN
Skrás.: 30-05-94
Km.: 109.000
Prísur: 89.600,- Garanti*
Sýnaður 03-00

OPEL ASTRA 1,6 I STW.
Skrás.: 03-11-97
Km.: 35.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 GLI
Skrás.: 08-03-89
Km.: 250.000
Prísur: 36.600,-

HYUANDAI ACCENT 1,5
Skrás.: 02-01-98
Km.: 25.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 13-01-98
Km.: 70.000
Prísur: 137.600,- Garanti**

RENAULT MEGANE 1,6 3 HURDAR
Skrás.: 22-05-96
Km.: 100.000
Prísur: 65.600,-
Sýnaður 09-00

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 03-11-98
Km..:59.000
Prísur: 135.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,6
Skrás.: 22-09-95
Km.: 87.000
Prísur: 74.600,-

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 28-10-93
Km..:140.000
Prísur: 83.600,- Garanti*

CITROEN XANTIA DIESEL
Skrás.: 01-06-95
Km.: 266.000
Prísur: 69.600,-
Sýnaður 10-00

TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B
Skrás.: 11-08-98
Km.: 17.000
Prísur: 132.600,- Garanti**

PEUGEOT 106 DIESEL
Skrás.: 01-08-95
Km.: 118.000
Prísur: 66.600,-
Sýnaður 03-00

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B
Skrás.: 30-09-98
Km.: 52.000
Prísur: 115.600,- Garanti**

CITROEN BX DIESEL
Skrás.: 01-11-88
Prísur: 25.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6
Skrás.: 19-11-98
Km.: 15.000
Prísur:124.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Skrás.: 16-08-91
Km.: 134.000
Prísur: 42.600,-
Sýnaður 01-01

VØRUVOGNAR

MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL Skrás.: 11-05-00
Km.: 9.000 Prísur: 128.600,- Garanti*

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN.
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

Sosialurin - 211200

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-fri. 8.00-17.00
TOYOTA TOYOTA Reyni Service TOYOTA
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

gult cyan magenta svart